Leikrit



# Ikki stundir til jólini

Landsmiðstøðin

## Ikki stundir til jólini

Eftir Ove Vith
Týtt hevur Árni Jacobsen

## Leikarar:

17 ella 18 næmingar kunnu hava hvør sín leiklut – tveir av teimum umfatandi. 2 av næmingunum skulu hava góða sangrødd. Uglin kann vera ein rødd (tó kann ein lítil næmingur hava henda leiklut). Til ein lítlan pall ella um umstøður ikki eru at hava so nógvar leikarar, kunnu leiklutirnir lættliga samanfatast, so at leikararnir gerast færri.

| | |
|---|---|
| Jólamaðurin | týðandi leiklutur |
| Vættra-Niss | týdningarmesti leikluturin, skal hava sangrødd |
| Vættra-Tummas | skal hava sangrødd |
| VættraTina | |
| Vættra-Rasmus | |
| Vættra-Lena | |
| Vættra-Massi | |
| Vættra-Kaspar | |
| Vættra-Karin | |
| Vættra-Ina | |
| Vættra-Janus | |
| Vættra-Pætur | |
| Vættra-Vera | |
| Vættra-Klávus | |
| Uglin | møguliga bert ein rødd |
| Tænastuvætturin | |
| Gamlivættur | |
| Vættrateknikarin | |

| | |
|---|---|
| Vanlig skrift: | replikkir |
| *Skráskrift:* | *rørslur og umstøður á pallinum* |

Nýtast kunnu einføld baktjøld – best í bláum – tó við nýtslu av sertjøldum til vetrarmyndir. Haraftrat skal nýtast:
Eitt sjónvarp (við møguliga tilsettum videospælara, um antennumóttøka ikki er møgulig). Móttøkuslit er týdningarmikil partur.
Skelti (við fóti) áskrivað: VANDI, KAVI FYRI FRAMMAN.
2 steinar úr pappmaché (t.d. bygdir yvir tveir krakkar).
Vættraklæði, hálsturruklæði, tveir gávusekkir, ein amboðskassi, lenistólur (el. líkn.) – møguliga við fótskamli, lítið borð, kaffikanna, fat, bakstur, koppur, puttur.

**1. partur**

*Baktjaldið kann vera blátt – ella málað vetrarumhvørvi. Í staðin fyri máling kunnu nýtast ”sætkulisser”. Nakrir vættrar eru á pallinum. Summir stákast aftur og fram berandi sekkir, har jólagávur stinga uppúr. Ein vættur fæst við at seta skelti upp við áskriftini: VANDI – KAVI FYRI FRAMMAN! Ein savnar saman grankonglar í ein posa, og mitt á pallinum – á einum steini av pappmaché – sita tveir vættrar og práta.*

Vættra-Niss: *(veipar við ørmunum* Hygg uttan um teg . . . . tað er farið at kava. Jólaaftan nærkast av álvara . . . . og tó er einki við jólunum í ár.

Vættra-Tummas: (hyggur trútin niðurfyri seg) Nei . . . púra rætt. Eg dugi ikki at koma í jólalag . . . Uff! (hyggur upp) Jólamaðurin hevur alla skyldina!

Vættra-Niss: *(suffar)* Ja, hvør skuldi trúð, at tað skuldi enda soleiðis við jólamanninum. Hann hevur ongan áhuga fyri jólunum . . . ella tí, ið hevur við jólini at gera. Nei . . . . .

Vættra-Tummas: Bara sjónvarpið . . . video og Dagur og Vika fara við allari hansara tíð í ár.

Vættra-Niss: Men, hvussu ber tað til, at tað er soleiðis vorðið? Eg haldi . . . . jólini hava jú altíð verið naka serstakt hjá jólamanninum, heldur tú ikki tað?

Vættra-Tummas: *(suffar djúpan)* Júeee . . . eg veit ikki . . . tað er eins og hann er hildin uppat at liva tað rættiliga vættralívið!

Vættra-Niss: Ok, ja . . . . (reisist spakuliga og fer fram á pallin og syngur):

*Lag: Á, grannatræ*

Hygg, jólini – eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.

Tá kavin fjalir dal og líð,
tá gleðist eg um jólatíð!
Og jólini – eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.

Og børnini, tey gleða seg,
skjótt jólaaftan verður!
Og júst í hesi jólaverð,
er stákanin við jólaferð,
tá gerast jól eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.

*Vættra-Tummas reisist eisini og stillar seg við liðina á Vættra-Niss og syngur:*

Ja, ei eg dugi gleða meg,
alt jólalag er burtur,
tí jólamaður – dú, ádú!
– bert sjónvarp hevur hansar' hug.
Tó eru jól eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.

Vættra-Niss: Tíverri er tað alt ov satt,
ja, jólamaður svíkur.
Hann plagar jú at leiða alt,
og vit, vit okkum gera dælt,
tí jólini – eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.

Vættra-Niss: *(uppgevandi)* Okk ja. Tíverri alt ov satt - tað, sum vit hava sungið.

Vættra-Tummas: Men skulu vit báðir vættrar góðtaka, at jólamaðurin er uppsteðgaður og situr frammanfyri sjónvarpskassan dagin langan?

Vættra-Niss: *(flennandi)* Nei, tað ætla vit okkum als ikki at gera!

Vættra-Tummas: Jólini skulu ikki bert upplivast gjøgnum sjónvarpið. Jólini eru nakað rætt, nakað gott, heitt og deiligt.

Vættra-Niss: Vit mugu royna at fáa fatur í onkur av hinum, so vit kunnu leggja ætlanir. Skulu vit ikki gera av at hittast á sama staði saman við hinum . . . . á midnátt?

Vættra-Tummas: Jú, tað er í lagi – um midnáttina – tá er jólamaðurin púra burtur í jólaræðufilminum í sjónvarpinum!

*TJALDIÐ*

**2. partur**

*Sama baktjald sum í 1. parti. Nú er midnátt. Projektørljós við lutvís spreiddum skini ímyndar mánalýsið. Av og á hoyrist ein ugli ýla (næmingur). Ein fyri og annar eftir koma teir smáu vættrarnir inn á pallin báðu megin frá. Teir eru í tjúkkum hálsturru-klæðum, og tað sæst á teimum, at kalt er úti. Onkrir standa og smátrippa fyri at halda hitanum (allir eru smurdir við næsa- og kinnaroða fyri at ímynda kuldan). Vættraniss stígur upp á annan av steinunum, hann fyrr sat á í 1. parti. Vanligt smáprát.*

| | |
|---|---|
| Vættra-Niss: | *(klappar saman hendur)* Halló tit! . . . . lurtið eftir *(so við og við gerst friðaligt)*. Gott! Nú skal eg siga tykkum eitt sindur um or-søkina til, at tit eru vorðin lokkað út higar í skógin mitt á nátt! |
| Vættra-Tina: | Ja, puha . . . . og eg, sum nú átti at ligið heima undir mínari flógvu vættradýnu. |
| Vættra-Lena: | Ja, eg vóni so ikki, at jólamaðurin varnast hetta, sum vit gera! |
| Vættra-Niss: | Lurtið nú!!! Tað er júst tí, vit eru savnað her! Jólamaðurin er upptikin av at hyggja at jólaræðufilmi í sjónvarpinum ”Agent 00 jól”, so hann verður ikki tann fyrsti, ið finnur út av nøkrum. Okkara trupulleiki er, at jólamaðurin ikki als ikki er áhugaður í jólunum í ár. Han situr sum negldur frammanfyri tað býtta sjón-varpið dag sum nátt. Ikki so frægt sum hann hyggur oman í jólagávuverkstaðin . . . soleiðis sum hann er vanur upp undir jól! |
| Vættra-Kaspar: | Ja . . . . og hvørt kvøld verður borðreitt fyri honum við rísingreyti frammanfyri sjónvarpið. |
| Vættra-Niss: | Eg . . . vil fegin vita, hvat tit halda, vit kunnu gera við tað. Eg komi so í øllum førum ikki í jólahýr við hetta lag! |
| Vættra-Karin: | Hvør veit? Kanska verður endin tann, at als eingi jól verða í ár! |
| Vættra-Ina: | *(sker í grát)* Aaaa . . . *(tekur eitt stórt lummaturruklæði fram og snýsir sær harðliga)*. |

Vættra-Janus: Uff . . . altíð skal hon gráta . . . *(fýsir at henni)*. Gráti-Ina!!

Vættra-Niss: Tigið nú!! Tit áttu heldur at sagt mær, hvat vit skulu gera.

Vættra-Ina: *(grátandi)* Uuuuuu . . . . her er einki at gera!!

Vættra-Pætur: Pota eitt sindur av kava í holið á hasum grátivættinum!

Vættra-Niss: *(harmæltur og álvarsamur)* HALDIÐ NÚ UPPAT!!

Vættra-Kaspar: Hvussu hevði verið at tikið eina stóra sleggju og smildrað sjónvarpsskíggjan hjá jólamanninum?

Øll: Flenna hjartaliga.

Vættra-Vera: Kundu vit ikki málað skíggja svartan, soleiðis at jólamaðurin heldur, at sjónvarpsfólkini eru farin í jólafrí?

Vættra-Klávus: (háðandi) Ja . . . ha, ha . . . handa var góð!!! Vit kundu eisini mála skíggjan hvítan, soleiðis at jólamaðurin heldur, at sjónvarpsfólkini eru farin á skíferiu . . . . ha, ha, ha, ha!!

Vættra-Lena: Vit kunnu fara avstað við antennuni. So sær hann einki.

Vættra-Rasmus: Nei . . . nú veit eg!!! Lurtið nú!!!

Vættra-Niss: Ja, ja, vit lurta øll somul!!

Vættra-Rasmus: Vit fylla sjónvarpið við vatni og gera tað til eitt akvarium . . . so heldur jólamaðurin, at tað er pausumynd sum í Gekkinum.

Vættra-Ina: Uff . . . . so vakja vit bara fiskarnar . . . Uuuuhuuuu!!!!

Vættra-Niss: Eg haldi, tað hevði verið eitt gott hugskot, um vit kundu gjørt eitt ella annað við antennuna (snarar sær móti Vættratummasi). Kanska tú kanst klúgva upp á takið og loysa hana!?

Vættra-Karin: Ja, soleiðis at antennan dettur í høvdið á jólamanninum.

Vættra-Klávus: Býtta . . . . so uppdagar hann tað!!!

Vættra-Niss: Lurtið!! . . . Vættraklávus . . ófatiligur jólahýrur, tú ert í í ár! Ert tú komin við nøkrum hugskoti?

Vættra-Klávus: Neieeee . . . men eg veit okkurt. Eg hugsi eitt sindur um tann gamli uglin . . . tit vita - hin uppi í øsputrænum.

Vættra-Tummas: Uglin . . . hvat um hann?

Vættra-Klávus: Sum tit ivaleyst vita, so er uglin ein vísur fuglur. Kanska fáa vit onkur góð ráð frá honum!

Vættra-Massi: Og hvussu skulu vit fáa fatur á honum . . . . ha??

Vættra-Klávus: Jú, sært tú . . . seinast eg var í skóginum . . . tað var eisini um midnáttina . . . eg var saman við mammu og pápa . . . . vit gingu og sungu mánalýsissangin . . . og tá kom uglin brádliga flúgvandi.

Vættra-Ina: Av mánalýsissanginum?

Vættra-Klávus: Júst tað! Hann segði, at honum dámdi so væl mánalýsissangin, og kanska fáa vit hann at hjálpa okkum, um vit syngja mánalýsissangin!?

Vættra-Niss: Hvat siga tit??

*Spjadd undirtøka sum t.d. „Ja . . . latið okkum tað!“ . . . „Júeee, gott hugskot!“ . . . osfr.*

*Øll syngja:* *Lag: I skoven skulle være gilde*

Í skóg í náttartíma
at ganga kennist gott!
So trygt í myrkri tykjast kann,
ja, sjálvt um tað er nátt.
Eg móti lofti sloti
og kenni náttarlotið.
:,:So bøllutur har mánin er,
hann smíl um andlit ber!”:,:

Ein lítil grein kann brotna,
so hvølt tað ljóðar, tí
so sjáldan nakar ferðast her

í skógi náttartíð.
Og nú er jólatíðin,
og hvít er fjallalíðin,
:,:og kavafoldin ljósi í
sum silvur glógvar fríð.:,:

Viðhvørt so náttarkvirran
av ugla brotin er,
og ljóðið gjøgnum myrkrið tá
sum náttarheilsan fer.
Og tá ið kavin dalar,
í stillum hann tá talar
:,:og sigur mær, at skógur er
tað besta stað í verð!:,:

Vættra-Ina: Ááá . . . sum hasin sangurin er fittur!!

Vættra-Rasmus: Júeee . . . sjálvt um fullmáni ikki er enn!

Vættra-Niss: Nei, tað er tað ikki, men kanska kemur uglin hóast tað!

Uglin: *(rødd, ið møguliga kemur úr erva)* Eg eri longu her. Eg havi sitið her alla tíðina og eygleitt tykkum smáu vættrar hiðani av grein míni yvir høvdunum á tykkum!

*Vættrarnar hyggja upp í loft.*

Vættra-Tummas: Heldur tú ikki, at mánalýsissangurin var góður?

Uglin: Á, júúú . . . . Mær dámar so væl handa sangin . . . .serstakliga hatta um náttarheilsanina hjá uglanum!

Vættra-Niss: Hoyr meg, gamli ugli!! Vit hava staðið her og tosað um jóla-mannin og hansara óvana, og . . . . *(verður avbrotin)* . . .

| | |
|---|---|
| Uglin: | Ja, ja, ja . . . eg havi hoyrt alt, sum tit hava sagt! Og nú vilja tit hava meg at hjálpa tykkum . . . . . ikki so?? |
| Øll í kór: | Júúúúú! |
| Uglin. | Hmmmm . . . . eg skilji væl, at tit eru hørm um hetta, tí um jóltíðir eigur jólamaðurin ikki at sita og stara í sjónvarp. Hann skal fyrireika ta hugnaligu tíðina, ið er á veg. Vita tit, kæru vinir mínir, at tað fer at kava? |
| Øll í kór: | Meira kavi!!???? |
| Uglin: | Jaøøø . . jú . . . eg kenni tað á mær – á veingjafjaðrunum. Tær braka . . . og tað er gott tekin! . . . . Ná, men aftur til jólamannin. Ein einfald loysn er: Eg flúgvi yvir og seti meg á antennuna soleiðis av og á . . . . við hvørt leingi . . . við hvørt styttri . . . so . . . . hmmm . . . kemur kavi á skíggjan, og so gevst hann ivaleyst at hyggja í sjónvarp. |
| Vættra-Karin: | Hatta var eitt gott hugskot, Ugli gamli! Nær fert tú at gera tað? |
| Uglin: | Hmmmm . . . . tað kann eg gera, tá ið tit halda, at eg skal. Men . . . eheee . . . kundu tit ikki fyrst gjørt mær eina tænastu . . ha??? |
| Vættra-Niss: | Sjálvandi, Ugli gamli! Hvat skuldi tað verið? |
| Uglin: | Hmmm . . . . Tað er ein sangur . . . kunnu tit ikki syngja tað vakra ørindið um uglan, sum ýlir í náttarmyrkrinum . . . uuuuu, tað ørindi dámar mær so væl. |

*Øll syngja:*

Viðhvørt so náttarkvirran
av ugla brotin er,
og ljóðið gjøgnum myrkrið tá
sum náttarheilsan fer.
Og tá ið kavin dalar,
í stillum hann tá talar

:,:og sigur mær, at skógur er

tað besta stað í verð!:,:

*Vættrarnir fara av pallinum.*

*TJALDIÐ*

**3. partur**

*Ímyndar stovuna hjá jólamanninum. Baktjaldið kann vera einlitað – møguliga við einum vindeyga. Jólamaðurin situr væl fyri í einum bleytum stóli og hyggur í sjónvarp (skal vera eitt rættiligt sjónvarp). Við stólin hjá jólamanninum stendur eitt lítið borð. Frammanfyri stólinum er møguliga ein fótaskammul.*

Jólamaðurin: *(klappar spentur saman hendur)* Óført . . . góð sjónvarpssending, gott undirhald *(flennir harðmæltur og hyggur seg í kring)*. Hoyr . . . ehe . . . halló!!! . . . fái eg skjótt kaffið, sum eg bað um?

*Ein lítil vættur við stórum fyriklæði kemur inn við einum bakka við kaffi, koppum og bakstri.*

Tænastuvætturin: Gerið so væl, jólamaður! Hetta skuldi verið ein so avbera góð køka!

Jólamaðurin: *(peikar á borðið, meðan hann alsamt starir í skíggjan)* Gott! Set tað bara har! Eg kann røra sjálvur!!

Tænastuvætturin: Júeøøø . . . *(verður standandi, vríggjar hendurnar).*

Jólamaðurin: *(ótolin)* Ja, hvat er tað so!!???

Tænastuvætturin: Jú . . . øh . . . jólamaður, eg skuldi í veruleikanum heilsa frá vættraverkstaðnum og spyrja, um tygum ikki vildu hyggja oman eftir teimum seinastu jólagávunum, sum . . . *(verður avbrotin)*.

Jólamaðurin: *(bítur í køkuna og tosar við mati í munninum)* Hyggja at jólagávunum á vættraverkstaðnum?? Tey kunnu ikki hava tað gott!! Vita tey ikki, at tann besta sjónvarpsrøðin – ”Fosturdóttir jólamansins” – byrjar skjótt?

Tænastuvætturin: Ná, ja . . . eheee . . . so fari eg!!

*Eina løtu seinni reisist jólamaðurin tungliga, hyggur seg illfýsin í kring og fer yvir til veggin, har ein puttur stendur. Hann tekur puttin og bankar niður í gólvið. Beinanvegin kemur ein eldri vættur inn vinstrumegin.*

Gamlivættur: Øhh . . . tú rópti . . jólamaður!!?

Jólamaðurin: *(framvegis firtin)* Ja, hvat bagir . . . hvar eru allir vættrarnir? Her siti eg og vil síggja eina góða røð og kundi væl hugsað mær eina rokaða skál av rísingreyti, og so er ikki eitt menniskja her!?

Gamlivættur: Jú, men jólamaður! Tað er vónandi einki nýtt hjá tær, at vit hava úr at gera við at fyrireika jólini?

Jólamaðurin. Ehee . . . *(eitt sindur lotur)* Ná, ja *(fer aftur til stólin og setist)* . . . men send mær allíkavæl eina rokaða skál av rísingreyti!

Gamlivættur: Jú, jú, jólamaður, eg skal síggja til, at greytur verður kókaður, men vit hava so nógv um oyrini í løtuni! (fer út).

*Jólamaðurin situr eina løtu og fylgir við sjónvarpissendingini, tá myndin brádliga hvørvur og kavarok kemur á skíggjan.*

Jólamaðurin: *(leypur upp)* Á, nei!!! Hvat bagir nú!!? Sendirøðin byrjar beinanvegin!!!

*Jólamaðurin bukar niður á sjónvarpsstólið, trýstir á nakrar knøttar, men einki hendir. Hann veipar við ørmunum og smokkar ørkymlaður niður í stólin, leypir so uppaftur og tekur puttin og bankar harðliga við honum niður í gólvið. Løtu seinni kemur Gamlivættur innaftur.*

Gamlivættur: *(hjartkyptur)* Hvat nú, jólamaður??? . . . jólagreyturin er ikki kókaður enn!!

Jólamaðurin: Eg leggi einki í greytin . . . send boð eftir einum vættrateknikara

beinanvegin. Okkurt álvarsamt er áfatt við sjónvarpstólinum . . . beinanvegin . . . . beint nú . . . . í stundini!!!

Gamlivættur: *(óttafullur)* Júmen, jólamaður . . . jú . . . júeee . . . *(vendir sær á og smárennir út av pallinum)*.

Jólamaðurin: *(setur seg tungliga aftur í stólin – brádliga er myndin aftur á skíggjanum)* Hvat nú . . ? Nú er sjónvarpið í lagi aftur!!! *(smálær nøgdur)*.

*Smárennandi úr vinstru síðu kemur ein eldri vættur inn á pallin við einum amboðs-kassa (kanska ílatin ketildrakt ella kittil).*

Vættrateknikarin: Her eri eg, jólamaður . . . eg eri vættrateknikarin!

Jólamaðurin: *(hyggur valla upp, men søkkur harafturímóti djúpari niður í stólin)* Sama ger!! Sært tú ikki, at nú er í lagi aftur?

Vættrateknikarin: Íðan . . . skal eg so ikki umvæla tað?

Jólamaðurin: Hoyr nú her . . . . *(hyggur illfýsin at teknikaranum og peikar á sjónvarpið)* . . . Er nakað at umvæla . . nei, eg spyrji bara??

Vættrateknikarin: Nei . . . *(boyggir seg inn yvir sjónvarpið - hyggur aftur um tað)* . . . . . tað . . . tað man tað ikki vera.

Jólamaðurin: So kanst tú gott fara, so at eg kann sleppa at síggja sjónvarps-røðina í frið og náðum.

*Vættrateknikarin yppir øksl og fer avstað við amboðskassanum. Jólamaðurin vríggjar hendurnar vælnøgdur . . . men so hvørvur myndin brádliga aftur. Aftur kavi á skíggja-num.*

Jólamaðurin: *(leypur á føtur sum úr einari rakett)* Neiiii . . . nú er aftur galið!!! *(rópar harðliga)* HETTA LÍKIST ONGUM . . . ØLL JÓLINI VERÐA SPILT . . . VÆTTRATEKNIKARI . . . . VÆTTRA-

TEKNIKARIIIIIII !!!

*Gamlivættur kemur leypandi inn á pallin við einari greytasleiv í hondini.*

Gamlivættur: Rópti tú?

Jólamaðurin: *(í øðini . . . trampar í gólvið)* Um eg rópti??!! Hvar er vættratekn-ikarin?

Gamlivættur: *(framvegis ørkymlaður)* Júmen . . . *(hyggur seg íkring)* hevur hann ikki júst verið her??

Jólamaðurin: Júeee . . . men HANN ER FARIN AVSTAÐAFTUR!!! HVAR ER HANN NÚ??? SJÓNVARPIÐ ER AFTUR Í ÓLAGI!!!

Gamlivættur: *(kláar sær í skallanum)* Jaee . . . ehe . . . so er hann helst farin . . . hann skuldi til Vættravíkar at umvæla eina jólagávumaskinu. . . . . . og sum jólamaðurin jú veit, so er tað sera týdningarmikið, at slíkt virkar Í ALLARI JÓLASTÁKANINI! *(áhersla løgd á tað seinasta)*.

Jólamaðurin. Áááá . . . *(blakar seg í stólin)*. Far tú bara . . .!! *(Kýstar við hond-unum)*.

*Frá vinstru koma Vættra-Niss og Vættra-Tummas.*

Vættra-Niss: Halló, jólamaður!!

Jólamaðurin: *(hyggur líkasælur upp á teir, smokkar so aftur saman í stólinum)* Halló, tit báðir . . . aftur órógvaður . . . hoyrið . . . *(rættir seg upp)*. Duga tit at umvæla eitt sjónvarp?

Vættra-Niss: Nix!! Og vit ætla okkum heldur ikki at gera tað!

Jólamaðurin: *(ovfarin)* Hvat . . . ??? Hvat vil tað nú siga?

Vættra-Tummas: Vilt tú avgjørt hava undirhald, so kunnu vit syngja ein sang fyri

tær!

Jólamaðurin: Ein sang?? *(avvísandi við hondini)* Nei takk . . . ongan áhuga!!

Vættra-Niss: Men vit syngja hann kortini!

Jólamaðurin. *(er rættiliga ørkymlaður)* Hvat sigur tú? Ná . . . .ehe . . so syngja tit hann, meðni . . . um einki annað betri er á skránni.

*Vættra-Niss og Vættra-Tummas stilla seg millum jólamannin og sjónvarpið og syngja:*

*Lag: "Der er noget i luften"*
Hvør árstíð mann flúgva framvið tær við skund,
tá vetur er farin, er várliga stund.
Brátt summarið kemur – og hitin teg nemur,
hoyr fuglanna song,
ið hoyrist í rísandi sól yvir døggváta ong.

Tá leyvið man falla, og heyst komið er,
og dagarnir styttast, mót vetrinum ber,
tá einki má svíkja, alt annað má víkja,
tí jól eru brátt,
so virkast má tíðliga og seint, ja, á degi sum nátt.

So nú hvør ein vættur má virka við ferð,
ei stundir at hvíla við sjónvarpið er.
Nú kuldin hann bítur, hygg kavin er hvítur
um tind og um dal.
Títt sjónvarp nú sløkk, tí frá hondum so nógv fáast skal!

*Vættrarnir báðir trína til viks. Jólamaðurin reisist tungan og fer yvir og sløkkir sjón-varpið.*

Jólamaðurin: *(hyggur upp á vættrarnar)* Rætt hava tit . . . mínir góðu vinir! Eg harmist . . . *(kínir sær um skeggið og er illa við)*. At hugsa sær . . . her havi eg nú hvønn dag upp undir jól sitið og gløtt í handa rútin *(peikar á sjónvaprsskíggjan)*, meðan allar mínar vættrar hava stríðst soleiðis, at vit kunnu verða liðug til jóla . . . uff, uff, uff *(hoknar eitt sindur saman, men fettir sær áaftur)*. Nú skulu vit arbeiða, vinir! Tit kunnu fegnir bera handa kassan *(peikar á sjónvarpið)* út í ruskbingjuna, so eg ongantíð síggi hann aftur!

*Við eitt tysja allir vættrarnir inn. Øll hini koma eisini og taka í hondina hvør á øðrum – venda sær móti áskoðarunum og heilsa.*

Øll syngja: *Lag: Á, grannatræ*

Hygg, hetta var eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.
Nú veturin og kavin er,
mót jólum skjótt nú tíðin ber,
og hetta var eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.

Og børnini, tey gleða seg
við øllum jólavættrum.
Tí her í jólalandi vit
nú stríðast hart við bit og slit.
So gerast jól eitt ævintýr
hjá stórum og hjá smáum.

Øll í kór: GLEÐILIG JÓL ØLL SOMUL!!!!

*TJALDIÐ*